


Í 1.000 kr.

| Rakstrarroknskapur | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 301.241 | 311.837 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 101.811 | 126.356 |
| Rentuinntøkur netto | 199.430 | 185.481 |
| Vinningsbýti av partabrævum og øðrum kapitalpartum | 665 | 408 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur | 16.815 | 12.297 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir | 522 | 288 |
| Rentu- og ómaksgjøld netto | 216.388 | 197.898 |
| Virðisjavning av virðisbrævum og útl. gjaldoyra v.m. | 6.447 | -2.341 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 7.743 | 7.323 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 230.578 | 202.880 |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | 117.754 | 104.417 |
| Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 15.772 | 8.730 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 407 | 1.903 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | 17.959 | 12.962 |
| Úrslit av kapitalpartum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | -2.806 | -1.039 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 75.880 | 73.829 |
| Skattur | 15.258 | 16.337 |
| Ársúrslit | 60.622 | 57.492 |
| **Býtið av ágóða** | | |
| Ársúrslit | 60.622 | 57.492 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 0 | 2.505 |
| Tøkur peningur tilsamans | 60.622 | 59.997 |
| Nýtt til vinningsbýti | 33.966 | 0 |
| Burturlagt til aðrar grunnar | 54 | 0 |
| At flyta til næsta ár | 26.602 | 59.997 |
| Nýtsla av tøkum peningi | 60.622 | 59.997 |

| Fíggjarstøða | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 55.190 | 45.583 |
| Áogn í lánistovnum v.m. | 143.415 | 249.675 |
| Útlán | 3.979.385 | 3.588.964 |
| Lánsbrøv v.m. | 679.266 | 758.975 |
| Partabrøv v.m. | 91.208 | 94.720 |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 26.408 | 19.730 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 1.276 | 1.490 |
| Ítøkiligar ognir | 128.611 | 135.344 |
| Egin partabrøv | 54 | 0 |
| Onnur ogn | 81.843 | 55.787 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | 4.360 | 3.985 |
| Ogn tilsamans | 5.191.116 | 4.954.253 |
| **Skuld** | | |
| Skuld til lánistovnar og tjóðbankar | 235.383 | 271.637 |
| Innlán | 3.947.217 | 3.791.944 |
| Onnur skuld | 125.173 | 63.793 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 6.194 | 6.382 |
| Eginpeningur: | | |
| Partapeningur | 679.311 | 0 |
| Ábyrgdarfæ | 1.361 | 11.564 |
| Yvirkursir við partabrævaútgávu | 159.779 | 0 |
| Javning til flutt avlop frá undanfarnum árum | 10.042 | 11.076 |
| Grunnur fyri egin partabrøv | 54 | 0 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 0 | 737.860 |
| At flyta frá ársins úrsliti | 26.602 | 59.997 |
| Eginpeningur tilsamans | 877.149 | 820.497 |
| Skuld tilsamans | 5.191.116 | 4.954.253 |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í javna** | | |
| Ábyrgdir | 104.760 | 86.374 |
| Aðrar skyldur | 25.098 | 109.350 |
| Tøl, ið ikki eru tikin við í javna tilsamans | 129.858 | 195.724 |

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# Àrsins Songrødd 2003

TÍÐINDASKRIV

Nærum fullteknað er til Ársins songrødd 2003. Tað eru bert nøkur fá pláss eftir í Suðuroy siga fyrireikararnir. Øll hini støðini hevur tað verið kravgangur at sleppa við í kappingini. Óvanliga nógv hava teknað seg í ár, og kanska er tað tí at Guðrun Jacobsen, sum luttekur í Donsku sendingini „Stjerne for en aftan" hevur sína ávirkan. Hon luttók í Ársins Songrødd, har hon gjørdist vinnari í 2001.

10 sangarar fara á pallin komandi leygarkvøld tann 29.mars. kl.23:00 í Badmintonhøllini í Havn, har kappast verður um hvør skal víðari í stóru finaluni í mai. Í ár hava luttakararnir heili 66 løg at velja ímillum, vanliga hava bert uml. 10 løg verið á skránni.

Frásøgufólkini í ár verða tey bæði Ragnhild Ellingsgaard og Jákup Jacobsen og aftaná kappingina verður tað stórt „lasara -og DJ-Show" við Martin Kjærbo. Atgongumerki fáast við dyrnar á kr.120,- og tiltakið byrjar sum áður nevnt kl.23:00. Dyrnar lata aftur kl. 04:00. Bussar koyra til og frá staðnum.

# Vindmyllur á Mýrunum

**Smápartafelagið Sp/f Røkt úr Vestmanna hevur seinastu mánaðirnar kannað vindviðurskiftini uppi á Mýrunum í Vestmanna við tí fyri eyga at reisa vindmyllur á staðnum**

TÍÐINDASKRIV

Kanningarnar higartil hava ført til, at Røkt nú hevur avgjørt at reisa myllurnar, treytað av, at felagið sleppur at binda í netið hjá SEV.

Røkt hevur optión uppá 3 Westas V47-660 kW vindmyllur. Myllurnar standa á einum 45 metra høgum torni. Veingjadiameturin er 47 metur og hvør myllan vigar umleið 60 tons við øllum.

Íløgan er umleið 15-17 milíónir krónir.

Verkætlanin kann framleiða el til umleið 2000 sethús, svaranadi til 3-4% av samlaðu føroysku elorkuni. Tá hugsað verður um oljunýtslu og dálking, kunnu myllurnar minka um oljunýtsluna, svarandi til umleið 2-3 milliónir krónur árliga.

Fæst loyvi frá SEV, at binda í netið, kunnu myllurnar standa á Mýrunum í august mánað í ár og lata grøna orku inn á netið.

Stýrið hjá SEV skal í næstum takað støðu til, um tað vil viðmæla eitt tílíkt loyvi, men tað er umboðsráðið sum tekur tað endaligu støðuna.






# Bardagi á palli í Klaksvík

**MáF skipar fyri skeiði í »stage-fight«**



SJÓNLEIKUR
*Tíðindi frá MáF*

25.-27. apríl 2003 skipar MáF – Meginfelag Áhugaleikara Føroya –fyri skeiði í »bardaga á palli«, ella »stage-fight« norðuri í Klaksvík.

»Bardagi á palli« er kynstrið at skapa ímynd av bardaga á palli ella í filmi, sum byggir á bardagakoreografi, strangar trygdarrutinur og samarbeiði.

Í mong ár hevur verið tosað um hetta skeið, sum stórur tørvur er á í okkara føroyska sjónleikaraheimi. Seinasta summar skipaði MáF fyri stórum útileiki á ólavsøku, har 100 fólk úr fleiri bygdum í Føroyum vóru við. Klaksvíkingar stóðu fyri bardaga-partinum.

– Vit hava hesaferð valt Klaksvíkina til skeiðið. Pláss er fyri 30 fólkum, og enn eru nøkur pláss eftir, sigur MÁF í tíðindaskrivi. Skeiðið byrjar Flaggdagin kl 18 og endar sunnukvøldið 27. apríl kl. 18. Sostatt verður alt vikuskiftið brúkt til undirvísing. Gist verður á skúlaheiminum og undirvíst í fimleikarhøllunum.

Lærari verður Kristoffer Jørgensen, kampkoreografur, stuntmaður, leikstjóri og sjónleikari úr Tromsø, ið ferðast runt fyri at undirvísa í bæði fekting, bardaga uttan vápn, orientalskum bardagateknikki við og uttan vápn, og japanska bardagaforminum aikido.

Á ferðum sínum kring Evropu undirvísir Kristoffer eisini í stuntteknikki, sirkusteknikki og gøtusjónleiki.

Í Noregi arbeiðir hann somuleiðis við ungdómi við sosialum- ella lesitrupulleikum, ella sum hava trupult við at laga seg eftir umstøðunum.

# Sløkkiliðsmenn úr Kollafirði á skeið

**Seinasta fríggjadag fingu átta sløkkiliðsmenn úr Kollafirði prógv handaði frá brandskúlanum hjá Tórshavnar Sløkkiliði. Áðrenn 2006 skulu øll sløkkiliðsfólk í Føroyum hava eina góðkenda útbúgving**



*Skeiðluttakarar og teir sum hava undirvíst á skeiðinum. Ovara rað f.v. Heiðrikur Christiansen undirvísari, Grettir Hammer,Petur James Hansen, Finnur Heri Johannesen og Leif Hansen skeiðluttakarar, Jón Herluf Persson undirvðísari og Hans David Hansen varasløkkiliðsstjóri. Niðara rað, f.v. Annfinn Reinert, undirvísari, Poul Adrian í Homrum, Heri Hansen, Jens Kristjan Magnussen og Vagnur Johannesen skeiðluttakarar og Kartni Jacobsen sløkkiliðsstjóri*

ÚTBÚGVING
*Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin 21. mars fingu átta sløkkiliðsmenn úr Kollafriði prógv handaði frá branskúlanum hjá Tórshavnar Sløkkiliði. Útbúgvingin er skipað eftir kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólki, sum kom í gildi 17. desember 2001. Skeiðið er sett til 88 tímar ella tvær vikur. Hetta er fyrsta skeiði eftir føroysku kunngerðini, og má tí metast sum eitt royndarskeið. Málið er at fáa endaliga góðkenning frá Mentamálaráðnum, soleiðis at brandskúlin hjá Tórshavnar Sløkkiliði, við sínum royndum og vitan á økinum, kann bjóða seg fram at útbúgva sløkkiliðsfólk úr øllum landinum. Eftir kunngerðini um útbúgving av sløkkiliðsfólki skulu øll sløkkiliðsfólk í Føroyum hava fingið eina góðkenda útbúgving áðrenn desember 2006.

# Føroya Tele havt aðalfund

**Ársúrslitið hjá Føroya Tele í 2002 var eitt vet betri enn árið fyri. Felagið hevi 53,5 milliónir í yvirskoti**



*Nýggi bygningurin hjá Føroya Tele, sum verður bygdur í Klingruni í Hoyvík*

FØROYA TELE
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin hevði Føroya Tele aðalfund, har ársroknskapurin fyri 2002 varð lagdur fram.

Úrslitið hjá felagnum var 53,5 milliónir krónur eftir at 13,1 milliónir krónur vórðu settar av til skatt.

Í 2001 var úrslitið 53 milliónir krónur, so úrslitið í fjør var eitt ánilsi størri.

Á aðalfundinum fór eisini næstformaðurin í nevndini, Ari Johanneson, úr nevndini, og fyri hann varð valdur Jógvan E. Ellefsen, advokatur.

Umframt hann vórðu valdir í nevndina Hákun Steingrímsson, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, sum er formaður, Reidar Nónfjall, stjóri í RN-Virkisleiðslu, sum er næstformaður og Tage M. Iversen, fyrrverandi deildarstjóri í Telestýrelsen í Danmark.

Starvsfólkavaldu umboðini í nevndini eru Janus Djurhuus og Bjørg Joensen.

# Kannaðu málið



*Tveir bilar rendur mánadagin saman á Norðara Ringvegi í Havn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrrapartin mánadagin var eitt ferðsluóhapp á Norðara Ringvegi í Havn. Ein bilur hevði koyrt út fyri eitt fult stoppskeltið frá Áargeil, og ein bilur, sum var á veg omaneftir rendi á hann.

Tá vit tosaðu við vakthavandi á politistøðini í Havn, visti hann onki at siga, men segði, at málið varð kannað í løtuni.